# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 23. september 2009

# Nerta ikki spæliloyvið

**Aganevndin hjá FSF hevur nú endaliga staðfest, at nevndin ikki hevur heimild at taka málið um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen upp til nýggja viðgerð**




Jákup Mørk

B36 boðar á heimasíðu sínari frá, at felagið nú hevur fingið endaliga úrskurðin frá Aganevndini í málinum um Christian Restorff Mouritsen.

Spælarin spældi ólógliga við, tá B36 tann 26. juli spældi í Runavík, men tann dystin tapti B36 kortini 3-0, og tí verður ikki gjørt nakað við tað úrslitið.

Um flytingina av spæliloyvinum sigur Aganenvdin, at at tað stendur greitt, at mál um flyting av spæliloyvum ikki kunnu leggjast fyri aganevndina, og harafturat er einki at leggja afturat tí viðgerð, sum er farin fram í kappingarnevndini, og at starvsnevndin onga viðmerking hevur.

Tí ger Aganevndin ikki meira við hetta málið, sum nú eftir øllum at døma er endaliga avgreitt.

Við ikki at taka málið upp til viðgerð, hevur Aganevndin altso heldur ikki tikið støðu til trætumálið, sum hevur merkt føroyskan fótbólt síðani beint eftir ólavsøku. Tí er spurningurin, um KÍ fer at royna at fáa málið flutt til ítróttardómstólin í Lausanne, sum er evsti myndugleiki innan fótbóltsheimin. Enn hevur einki mál úr Føroyum verið á vitjan hjá dómstólinum.

**Tað hevur tikið sína tíð, men nú tykist tað endaliga staðfest, at spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen verður verandi í B**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB/S | 24 | 14 | - | 6 | - | 4 | 59 | 38 | 21 | 48 |
| 2 | HB | 24 | 13 | - | 5 | - | 6 | 53 | 33 | 20 | 44 |
| 3 | B71 | 24 | 12 | - | 7 | - | 5 | 51 | 34 | 17 | 43 |
| 4 | TB | 24 | 12 | - | 5 | - | 7 | 51 | 42 | 9 | 41 |
| 5 | B68 | 24 | 10 | - | 5 | - | 9 | 59 | 47 | 12 | 35 |
| 6 | Víkingur | 24 | 7 | - | 9 | - | 8 | 38 | 35 | 3 | 30 |
| 7 | NSÍ | 24 | 8 | - | 6 | - | 10 | 41 | 49 | -8 | 30 |
| 8 | Skála | 24 | 8 | - | 4 | - | 12 | 36 | 38 | -2 | 28 |
| 9 | FC Hoyvík | 24 | 9 | - | 1 | - | 14 | 31 | 50 | -19 | 28 |
| 10 | MB | 24 | 2 | - | 2 | - | 20 | 26 | 79 | -53 | 8 |

**24. umfar**

| Dystur | Dómari |
|---|---|
| B71-MB | Ransin Djurhuus |
| Skála-Víkingur | Andreas Josephsen |
| VB/Sumba-TB | Alex Troleis |
| NSÍ-FC Hoyvík | Bent Tommy Linklett |
| HB-B68 | Petur Reinert |




# Lagnustundin hjá TB

**Grannauppgerðin í Vági í kvøld, tá VB/Sumba og TB bresta saman, er sera avgerandi fyri møguleikarnar hjá TB at flyta upp. Samstund-is royna fýra av niðaru liðunum at sleppa undan at flyta niður saman við MB**




Hilmar Jan Hansen

Í kvøld verður triðsíðsta umfar í næstbestu mansdeildini spælt. Hetta umfarið skuldi upprunaliga havt verið síðsta týskvøld, men var útsett vegna dómaratrot.

Flestu eygu eru vent ímóti stóru suðuroyaruppgerðini, sum verður í Vági millum VB/Sumba og TB. VB/Sumba er fimm stig framman fyri B71 og sjey stig framman fyri TB, so tí hevur syðra suðuroyarliðið longu annan fótin í Vodafonedeildini.

Hinvegin er TB í harðari kapping við B71 um hitt uppflytingarplássið, og av tí at B71 á heimavølli tekur ímóti MB, sum longu langt síðani er farið niður, er lítið sannlíkt, at sandoyingar seta nakað stig til.

Sostatt er kravið til tvørámenn, at teir helst skulu vinna á VB/Sumba í kvøld, tí um B71 vinnur sín dyst og TB bara fær eitt ella einki stig, er B71 fimm stig frammanfyri, tá bar seks stig eru eftir at spæla um, og tá verður tungt hjá TB at sleppa upp í part aftur.

### Breitt botnstríð

Er spenningur um, hvussu verður við uppflytingini, er sanniliga eisini spenningur um, hvør skal fylgja MB niður, og har eru fýra lið í vandabólkinum, harav Víkingur og NSÍ eru tvey stig framman fyri Skála og FC Hoyvík.

Hinvegin hoyrir við til søguna, at tað kann henda seg, at bara eitt lið flytur niður, tí kabalin við niðurflyting úr Vodafonedeildini og uppflyting úr 2. deild hevur hug at renna saman, men so leingi einki er avgjørt har, ræður í fyrsta umfari um hjá hesum fýra liðunum at bjarga sær.

Og í kvøld eru tað tey ovaru av teimum, ið spæla ímóti teimum niðaru, tí Skála tekur ímóti Víkingi og NSÍ ímóti FC Hoyvík. Vinna tey bæði niðaru, er klumpurin enn tættari, tí so fara tey eitt stig fram um hini bæði. Men vinna hinvegin tey ovaru, eru tey fýra stig frammanfyri, tá bara seks stig eru eftir at spæla um.

Fimti dysturin er í Gundadali, har HB tekur ímóti B68. HB liggur í løtuni sum nummar tvey, mitt millum liðini, ið kappast um at flyta upp, meðan B68 er so gott sum uttan vanda fyri at flyta niður. Tí er hetta tann av dystunum í kvøld, har nógv minst stendur upp á spæl.